# ÍtróttaFYRIMYNDIN

***Leiðreglur:***

ÍSF heiðrar eini ítróttaFYRIMYND, sum við sínum góða lið- og felagsanda gevur sítt íkast til, at børn, ung og vaksin kunnu íðka sín ítrótt og njóta samanhaldið í lokalu feløgunum. Ársins ÍtróttaFYRIMYND er ein venjari, liðleiðari, stevnusamskipari ella okkurt heilt annað, ið við serligum innsatsi hevur viðvirkað til samanhaldið í sínum ítróttafelag. Viðkomandi hevur skarað framúr undanfarna árið, og hevur tí uppiborið heitið sum ársins ÍtróttaFYRIMYND.

***ÍtróttaFYRIMYNDIN er t.d. ein, sum:***

- Skapar gott vinarlag á liðnum ella í felagnum
- Tekur sín ítrótt í álvara og er góð fyrimynd fyri onnur
- Hevur ein jaligan hugburð og góða orku
- Syrgir fyri, at høllin er bíløgd til venjing ella kapping, t.d.
- Altíð stendur klár/ur við vatnpostarnar
- Kritar banan upp, so vit onnur kunnu spæla á honum
- Ger, at felagið, liðini og limirnir arbeiða væl saman
- Ella bara ein, sum á serligan hátt viðvirkar til samanhaldið í felagnum

***Arbeiðsgongd:***

- Øll kunnu innstilla eina ítróttafyrimynd, sum tey meta hevur virkað fyri at fremja lið- og felagsandan á serstakan hátt í undanfarna árið
- Nevnd Poul E Petersens tekur støðu til, hvør skal hava heiðurin sum ársins ÍtróttaFYRIMYND.
- Ein fyrimynd verður kosin hvørt ár. Nevndin kann taka avgerð um, at eingin fyrimynd verður heiðrað